*Kom og ver við til*

**"BÍBLIUDAGAR Í SILOA" – UNDIR HEITINUM:**

# EG OG SAMKOMAN

**LONGRI FRAM Á LEIÐ**



Í SILOA Í FUGLAFIRÐI

**frá hósdegi 18. til sunnudag 21. oktober 2012**

***4 dagar***

***19 bíbliutímar/fyrilestrar***

***7 samtalutímar***

***4 møti***

***11 lærarar***

***Fríløtur***

***Máltíðir***

***Hugni***



***Ætlanin er – um Gud vil – at hava eitt***
***4-daga bíbliuskeið, sum verður nevnt***
***"bíbliudagar í Siloa"***
***í Fuglafirði frá 18. til 21. oktober 2012.***
***Dagarnir verða hildnir undir heitinum:***

## "EG OG SAMKOMAN – longri fram á leið"

Paulus, ápostul, áminnir í 1. Tim. 3,15 um:
*"hvussu ein eigur at bera seg at í húsi Guds, sum er samkoma hins livandi Guds,* ***stuðul og grundvøllur sannleikans****".*



Vert kann vera at steðga á og spyrja:
"Hvønn veg fara **eg og samkoma mín**
– aftureftir ella frameftir – ella standa vit í stað?"

**Skráin**
Hesar fýra dagarnar vera fimm bíbliutímar/fyrilestrar og tveir samtalutímar um dagin. Tó vera fýra tímar og ein samtalutími sunnudagin. Harafturat vera máltíðir og frítøtur.

Møtt verður kl. 8.30 hvønn morgun. Byrjað verður við eini máltíð, og síðani verður farið í gongd kl. 9.00.

Øll fýra kvøldini vera møti kl. 19.30. Tey vera ein partur av døgunum, har luttakarar eisini hava høvi at vera við og luttaka. Møtini vera sjálvandi almenn. Umframt talur og vitnisburðar er ætlanin at hava góðar sangkreftir á møtunum.

**Allir tímarnir, allar máltíðirnar og øll møtini vera í Siloa**

## Lærarar og evni:

Svenning av Lofti, Tórshavn: 2 tímar

- Umsorgan fyri heimi og samkomu
- Samkoman og evangelisering

Jógvan Jacobsen, Tórshavn: 2 tímar

- Avbjóðingar – persónliga og í samkomuni

Jógvan Páll Sevdal, Leirvík: 2 tímar

- Heimið og samkoman

Símun Absalonsen, Tórshavn: 2 tímar

- "Hvussu lesur tú?"

Zacharias Zachariassen, Norðragøtu: 2 tímar

- Bønarlívið – persónliga og í samkomuni

Poul Jóhan Djurhuus, Glyvrar: 2 tímar

- Gleði í Harranum – persónliga og í samkomuni

Jógvan Zachariassen, Hoyvík: 2 tímar

- Vøkstur – persónliga og í samkomuni

Hjørleif Vang, Kaldbak: 2 tímar

- Bíbliulæra – persónliga og í samkomuni

Poul Færø, Klaksvík: 1 tíma

- Vitjanartænasta – í og út frá samkomuni

Richard Danielsen, Fuglafirði: 1 tíma

- Trúvirði skriftarinnar

Páll á Lakjuni, Fuglafirði: 1 tíma

- Samkoman – í eini broytingartíð

Tekning fer fram hjá
Páll á Lakjuni – tlf. 74 44 04
t-post: podl@olivant.fo
ella á t-postadressuni hjá Siloa:
siloa@siloa.fo

í seinasta lagi **8. oktober 2012**

**Kostnaður fyri skeiðið íroknað máltíðir:**
**kr. 500,00**
(skal gjaldast á staðnum)

**Gisting**
Hugsanin er, at tey, sum ikki hava ov langt at koyra, kunnu sova heima, hava tey hug til tað. Men møguleiki verður eisini at verða verandi í Fuglafirði hesar dagarnar. Tá skipar samkoman í Siloa fyri gisting. Tosið eisini við ella skrivið til Páll um tað.

**Kom og ver við til nakrar áhugaverdar, gevandi og lærurikar dagar um orð Guds.**

Stigtakarar: Svenning av Lofti, Poul Jóhan Djurhuus, Hjørleif Vang, Jógvan Páll Sevdal og Páll á Lakjuni